# myndum



Drotningarnar fullu. Fimtu ferðina á rað spældu føroysku flogbóltskvinnurnar fimm-settara móti Saaremaa í flogbóltsfinaluni. Men eftir fýra føroyskar sigrar var tað hesa ferð Saaremaa, sum átti tørn



Tað sá ræðandi út. Bjørk Herup Olsen setti spurtin inn ein umgang ov tíðliga. Og so var absolutt einki eftir í kroppinum, tá hon noyddist at taka 400 tungar metrar afturat



Fyri fyrstu ferð yvir høvur luttóku føroyingar eisini í rifluskjóting. Bergur Ingvarsson endaði aftastur av teimum trettan skjúttunum, men ungi føroyski skjúttin helt tó talan vera um eina spennandi og lærurika uppliving



Hitin var øgiligur hjá bogaskjúttunum, sum uttan skugga kappaðust, tá onnur á oynni hildu siesta. Tí var neyðugt við nógvum vatni. Bæði at drekka, og – sum her hjá Anniku Vang – til at svala sær høvdið